## VEÐRIÐ




**Í dag,**
Fyrrapartin upp í hvassan storm av norði og útnyrðingi og regn. Seinni klárar í við ælaveðri. Heglingur ella vátaslettingur. Vindurin minkar niður í strúk til skrið av norði. Hitin liggur millum 1 og 5 stig.




**Veðrið hósdagin**
Skýggjaloft við ælingi. Kavi ella vátaslettingur. Stívt andøvsgul av útnyrðingi. Út á dagin lot av ymsum ættum, sum veksur aftur av suðri, sum líður á náttina. Turt og hitin liggur millum 1 og 5 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin**
Skýggjað og seinnapartin fríggjadagin fer at regna vestaneftir. Hann veksur vindin til skrið av suðri og útsynningi. Hitin liggur millum 3 og 8 stig.

# Veðursjúka

**Tað nívir í sál og sinni at síggja regn og hoyra vind hvønn einasta dag. Teir dagarnar, tá tað ikki kavar. Við longsli verður bíðað eftir betri veðri**



VEÐUR
*Edvard Joensen*

Hyggi út gjøgnum vindeygað og síggi gráan koma heim gjøgnum dalin. Leggur seg so tungan um Svarthamrar og tekur seg heimeftir. Malinstindur hvørvur, og skjótt er rokið í Sørpum. Og brestur so í rútin. Eitt kavaæl.

Másarnir, sum hava hokkast niðanvert Fosshyl, gera eitt kast luftini. Vindurin tekur í teir, og teir hava ilt við at halda flognum. Seta seg her og har í Steigabønum. Kroysta seg niðurat. Summir við nevinum upp í lu, meðan aðrir stinga tað undir vongin. Tað eri ikki bara eg, sum kúri slíkar dagar.

Nakrar ær hava ligið í bønum hinumegin. Oman fyri Sarpavegin heimanvert Fossá. Tær hava tikið seg niðaneftir og standa nú við reyvini í veðrið undir garðinum. Síggja ikki út til at hava hug til nakað sum helst.

Kavaælið kemur á tær, og tær hvørva í rokinum, meðan Elis so hugagóður sigur frá, hvussu veðrið er kring landið, sum hann sær tað í vevmyndatólunum á telduskíggjanum í Útvarpinum.

Eg kulsi. Huguri n er ringur, men dagssetningurin er ikki greiddur, og blaðið skal út. So her er einki at gera við. Men tað verður ivaleyst sum hjá Mikkjali á Ryggi, at »av ringum huga eg spinni og slíti favnin títt.«

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -15 |
| Nuuk | -11 |
| Qaqortoq | -7 |
| Ammassalik | -12 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -2 |
| Seyðisfjørður | -2 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 11 |
| Tromsø | -2 |
| Bergen | 8 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 11 |
| Warzawa | 7 |
| Kiev | 8 |
| Bukarest | 4 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 6 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 14 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | 2 |
| New Dehli | 16 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 7 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 16 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 8 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár**
Eitt lágtrýst í landnyrðing úr Føroyum gongur í landnyrðing. Móti kvøldi nærkast eitt nýtt lágtrýst oyggjunum og fer hósnáttina fram við sunnan fyri. Tað hevur hvast og kalt høgættarrák við ælingi við sær.



Hósdagin fer ein hátrýstryggur yvir Føroyum, men leygardagin koma brúgvaløg við regni hendanveg frá einum lágtrýsti yvir Danmarkarsundinum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 10/1 kl. 06[00]–11/1. 06[00]. Hitin í gjár: 3,5°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° - Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 10/1 kl. 06[00]–11/1 kl. 06[00]
Avfallið higartil í januar: 123,1 mm

## V4-dráttur

**í drátti nr. 1570**
**8. jan. 2005**

**Tølini:** 2-18-20-23-32-35-36-37-47-49-53-68-72-76-90-93

**Vinnararnir eru:**
Snars. nr. 2775765 (FK í miðbýnum í Havn)

**Eykavinnararnir:**
Snars. nr. 2663841 (Farseðil)
Snars. nr. 2929678 (Shellstøðin á Tvøroyri)
Snars. nr. 2938221 (Shellstøðin í Vestmanna

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

RADIOHANDILIN
v. Persson & Persson
Landsins bestu parabolskipanir



· Søla og tænasta
· Verkstaður
· Antennu- og parabolmontering
· Útleigan

N. FINSENSGØTA 16 · TEL 31 82 77
e-mail: radioep@post.olivant.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

17. januar — Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. Jan | 08.14 | 20.40 | 07.14 | 19.40 | 07.29 | 19.55 | 10.14 | 22.40 | 11.14 | 23.40 | 06.29 | 18.55 | 05.29 | 17.55 | 08.29 | 20.55 | 09.29 | 21.55 | 07.59 | 20.25 | 09.14 | 21.40 |
| 13. Jan | 09.08 | 21.32 | 08.08 | 20.32 | 08.23 | 20.47 | 11.08 | 23.32 | - | 12.08 | 07.23 | 19.47 | 06.23 | 18.47 | 09.23 | 21.47 | 10.23 | 22.47 | 08.53 | 21.17 | 10.08 | 22.32 |
| 14. Jan | 09.58 | 22.19 | 08.58 | 21.19 | 09.13 | 21.34 | 11.58 | - | 00.32 | 12.58 | 08.13 | 20.34 | 07.13 | 19.34 | 10.13 | 22.34 | 11.13 | 23.34 | 09.43 | 22.04 | 10.58 | 23.19 |
| 15. Jan | 10.42 | 23.03 | 09.42 | 22.03 | 09.57 | 22.18 | 00.19 | 12.42 | 01.19 | 13.42 | 08.57 | 21.18 | 07.57 | 20.18 | 10.57 | 23.18 | 11.57 | - | 10.27 | 22.48 | 11.42 | - |
| 16. Jan | 11.25 | 23.46 | 10.25 | 22.46 | 10.40 | 23.01 | 01.03 | 13.25 | 02.03 | 14.25 | 09.40 | 22.01 | 08.40 | 21.01 | 11.40 | - | 00.18 | 12.40 | 11.10 | 23.31 | 00.03 | 12.25 |

5 707265 100036 >